# Fótbóltstátturin

Nú skal eg tykkum siga,
ið hvat Napolonia
– gomul hás og hølt –
fyri mær fortaldi,
tá kollfirðingar spældu
á fyrsta sinni bólt.
Meg minnist hana væl, tí hennar andi
reyk so søtt og hugnaligt av brandy
og blákardús – hon tugdi aldrin Dandy.
Hon átti eina geit – og líktist Gandhi.

2. Jú, so vítt hon visti,
vóru teir teir fyrstu,
ið framdu hetta spæl;
tá var hon ung og føgur,
og allar kringumstøður
hon mintist sera væl:
Bólturin hann var ein hvalabløðra,
uttan eins og innan smurd og tjørað
og tí ikki tespulig at røra
– skallaði tú, fórst tú straks at sløðra.

3. Ongar fótbóltslógir,
teir runnu bert sum óðir
og eltu bløðruna
í veltum og í hyljum,
á heyggjum og í giljum
og gjøgnum fjøruna.
Hann, sum bóltin upp til himnasala
kundi sparka – so hann aldri dala
mundi meira – ikki um at tala –
varð hildin vera bestur til at spæla.

4. Eingir fótbóltsbúnar;
brøkur bláar, brúnar,
kollhúgvur og kot,
yviralls og vøttir,
hálsklút og skøddir
sum skuldu teir á flot.
Í klovstivlum teir spelaðu um eingir,
í húðaskóm og klássum, raskir dreingir,
og skølingum, sum um teir høvdu veingir
– men fótbóltsstivlar brúktu avgjørt eingir.

5. Tað var ein kollfirðingur
– hjólbeintur, men kringur –
sum við róp og skrál
fann uppá at gera
– tað kann eg garantera –
á fyrsta sinni mál.
Ein annar, sum teir nevndu Pól hjá Palla,
sum tann fyrsti fann uppá at skalla
– at gera slíkt eg vil ei anbefalla –
tí Pól hjá Palla dovnaði med alla.

6. Meg minnist dyst ein ringan
ímillum hósvíkingar
og kollafjarðarlið,
meir enn fýrogtjúgu
av hesum gørpum prúðu
mannaðu hvørt lið.
Dysturin hann stóð í tímar tríggjar,
hvalabløðran hvarv ímillum skýggja,
so teir máttu blása eina nýggja
– at enda noyddust hósvíkingar flýggja.

7. Tit væl gita kunnu,
at kollfirðingar vunnu
og róptu halgasjey,
sum ikki skal forundra:
kollfirðingar hundrað
og hósvíkingar tvey.
Ja, so fortaldi gamla Napol’nia,
hvørs andi angaði so hugnaliga
av blákardús og brandy íðuliga.
Um alt er skrøgg, eg tori ei at siga.

*T. N. Djurhuus (1928 -71) yrkti.*